**15. juni 2015**
**Mál:** 14/01020-37
**Tygara skriv:**
**Viðgjørt: JS**

# Tilmæli frá stýrisbólkinum til landsstýrismannin um at seta í verk mammografiscreening í Føroyum

## *Innleiðing*

Í Krabbameinsætlanini fyri Føroyar frá 2009 varð mælt til, at landsumfatandi mammografiscreening verður sett í verk í Føroyum (tilmæli nr. 12). Í ætlanin varð mælt til, at screeningin skal "...í fyrstu atløgu fevna um kvinnur í aldrinum 50-69 ár, men møguliga seinni víðkast til aðrar aldursbólkar".

Sum tað framgongur av løgtingsfíggjarlógini fyri 2015 er, í samsvari við Krabbameinsætlanina, politisk avgerð tikin um at raðfesta mammografiscreening í 2015. Í hesum sambandi hevur stýrisbólkurin fyri krabbameinsøkið viðgjørt, hvussu ein tílík skipan kann verða sett í verk.

## *Grundarlagið fyri tilmælinum í krabbameinsætlanini*

Ein screening kann avdúka broytingar í bróstinum, sum kvinnan ikki kann merkja, tá hon sjálv kannar bróstini. Mammografi kann ikki fyribyrgja bróstkrabba, men kann avdúka krabbamein á byrjunarstigi, sum økir um vánirnar fyri, at sjúkan kann lekjast.

Sambært ECAC[1], er munandi evidensur fyri, at mammografiscreening er ein úrslitagóður háttur at minka um talið á kvinnum, sum doyggja av bróstkrabba. Sjey kanningar, sum fevndu um yvir eina hálva millión kvinnur, hava víst eina lækking í deyðiligheit av hesari sjúkuni upp á 25% fyri tær kvinnur, sum vórðu *bjóðaðar* screening. Deyðiligheitin fyri tær kvinnur, sum so *luttóku* í screeningini, lækkaði við einum triðingi.

Virðið av mammografiscreening av kvinnum undir 50 ár er kortini óvist, sigur ECAC. Kodeksið mælir til, at kvinnur fáa bjóðað screening fyri bróstkrabba, frá tí tær eru 50 ára gamlar. Screeningin skal gerast samsvarandi teimum evropeisku leiðreglunum fyri góðskueftirlit av mammografi[2].

Í samsvar við hetta, mælir danska Heilsustýrið til, at kvinnur í aldursbólkinum 50-69 ár verða screenaðar annað hvørt ár.

ECAC vísir á, at fjøruti ár við kliniskum kanningum, luttøku av fleiri hundrað granskarum og heilsustarvsfólki, umframt fleiri hundraðtúsund kvinnum í áratíggju longum kanningum, hevur givið úrslit til nóg góða skjalprógvan av effektivitetinum av mammografiscreening, sum heimilar, at hetta verður eitt tilboð í almenna heilsuverkinum.

---

[1] European Code Against Cancer

[2] European Guidelines for Quality Assurance in Mammography

**Tilmæli frá stýrisbólkinum fyri krabbameinsøkið**
Eftir at stýrisbólkurin hevur viðgjørt málið á fleiri fundum, er bólkurin komin ásamt um mæla til eina skipan við mammografiscreening í Føroyum, har hesi viðurskifti eru galdandi:

- At talan verður um eina almenna skipan, sum verður staðsett á Landssjúkrahúsinum
- At aldursbólkurin verður 50-69 ár at byrja við, men við møguleika fyri at víðka bólkin seinni.
- At talan verður um eitt 24 mðr. interval.
- At tær umleið 5.000 kvinnurnar í aldursbólkinum verða javnt býttar árliga, soleiðis at talan verður um umleið 2.500 kvinnur um árið, sum fáa tilboð um screening.

Sambært Landssjúkrahúsinum kunnu allar samráðingar verða avgreiddar í juni mánað. Út frá hesum metir sjúkrahúsið, at skipanin kann verða í rakstri soleiðis, at kvinnurnar verða innkallaðar og screenaðar frá 1. desember 2015. Tá eru gjørdar neyðugar umbyggingar, KT skipanir eru tillagaðar, fólk sett í starv og royndarkoyringar gjørdar fyri at tryggja, at allar mannagongdir virka lýtaleyst.

Mælt verður til, at skipanin verður sett í verk skjótast gjørligt, soleiðis at skipanin í seinasta lagi kann verða í rakstri frá 1. desember 2015.

**Fíggjarlig viðurskifti í sambandi við at seta í verk tilmælið hjá stýrisbólkinum**
Niðan fyri verður útgreinað nærri stovnsetanarkostnaðin og rakstrarkostnaðin av at seta tilmælið í verk.

**Stovnsetanarkostnaður**
Kostnaðarmetingin fyri stovnsetan av tilboðnum verður mettur at verða umleið 1,2 mió. kr. sambært Landssjúkrahúsinum, tá er íroknað uppseting og licensir til KT-veitara, tillaging í mínboks, verkætlanarleiðsla og umbyggingar v.m.

| Evni | Frágreiðing | kostnaður |
|---|---|---|
| Veiting frá KT veitara til avgreiðslu av Mammografi screening | Landssjúkrahúsið brúkar eina skipan frá Sectra til at handfara Røntgen kanningar. Tann parturin, sum hevur við mammografiscreening at gera, er við í skipanini. | **583.840,- kr.** |
| Veiting frá Elektron | Tillaging í Mínboks | **60.000,- kr.** |
| Broytingar í Hølisviðurskiftum | Flyta mammografin, og tillaga hølisviðurskiftini | **345.000,- kr.** |
| Verkætlanarleiðsla | Kanningar, fundarvirksemi, dokumentasjón, fasilitering, verkseting | **200.000,- kr.** |
| Tilfar og marknaðarføring | | **50.000,- kr.** |
| **Samla útreiðsla** | **Tilsamans fyri verksetingina** | **1.238.840,- kr.** |

**Rakstrarkostnaður fyri eitt heilt ár**

Árligi rakstrarkostnaðurin verður mettur til umleið 2,3 mió. kr. Hetta veldst nógv um, hvør loysn verður vald viðvíkjandi lesing av myndum og aðrar fyritreytir í hesum sambandi. Um tilboðið verður sett í verk 1. desember 2015, verða rakstarútreiðslurnar umleið 190 tús. kr. í 2015.

Hartil kemur avleitt kliniskt virksemi, t.v.s. økt tal av tilburðum av bróstkrabba í ávíst áramál, sum avleiðing av screeningini. Tað er ein sannroynd, at jú fleiri kvinnur verða kannaðar, jú fleiri tilburðir verða funnir í fyrstu atløgu. Hetta talið fellir helst aftur til eitt útgangsstøði, sum er á leið tað sama sum frammanundan. Tó vilja hesar kvinnur í framtíðini koma fyrr í viðgerð.

Útreiðslurnar til ein bróstkrabbatilburð fevna um eitt nú skurðviðgerðir, stráluviðgerðir, kemoviðgerðir v.m. – kostnaðurin kann saktans liggja um einar 200 tús. kr. fyri hvønn tilburð.

Sambært Landssjúkrahúsinum hevur høga virksemið farnu 1-2 árini elvt til stórar avbjóðingar innan økið, bæði fíggjarliga og rakstrarliga. Tað er sera torført at meta um hesar útreiðslur, men sambært Landssjúkrahúsinum kann væntast, at meirútreiðslurnar tvey tey fyrstu árini fara at verða umleið 1,5 mió. kr. um árið. Um grundarlag verður tikið í hesi meting, verða samlaðu rakrarútreiðslurnar tvey tey fyrstu árini umleið 3,8 mió. kr.

Stýrisbólkurin fyri krabbameinsøkið

| | | |
|---|---|---|
| *Turid Arge*<br>*aðalstjóri* | *Dorrit Beck Joensen*<br>*kommunulækni* | *Jóhan Poulsen*<br>*Yvirlækni* |
| *Maria Debess*<br>*sjúkrarøktarfrøðingur* | *Jákup N. Olsen*<br>*formaður í Krabbameinsfelagnum* | *Pál Weihe*<br>*Yvirlækni* |
| *Henrik L. Hansen*<br>*virkandi landslækni* | *Bjarni á Steig*<br>*leiðandi yvirlækni* | |